## Spenningur í 2.deild

Í 2. deild í talvi vunnu toftamenn á oddaliðnum úr Vestmanna, og tað merkir, at fleiri lið kunnu fáa vestmenningar aftur, sum annars hava verið suvirenur í seinnu helvt. Toftamenn og bæði havnarliðini í 2. deild hava góðar møguleikar at órógva oddaliðið seinastu tvey umførini.

**-cens**

## Helgi skal verja NM-heitið

Liðkappingin heldur frí komandi vikuskiftið. Tíggju av okkara bestu telvarum undir 20 ár fara í ein beinan útnyrðing at umboða Føroyar. Spennandi verður millum annað at vita, um tað eydnast Helga at endurvinna NM-heitið. Fylgið við á HYPERLINK „http://www.faroechess.com/" www.faroechess.com.

-cens



# Klaksvíkingar hóma gullið



*Ólavur Simonsen fyri Klaksvík og John Rødgaard fyri Vestmanna stríðast um gullið, nú FM-kappingin fyri lið er heilt nær endanum*

**Hóast klaksvíkingar hava telvað ein dyst meira enn vestmenningar, verður tað torført hjá verandi føroyameistarunum úr Vestmanna at fáa oddaliðið aftur. Munurin er 4 stig**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Klaksvíkingar eru neyvan heilt nøgdir við úrslitið í Sandavági sunnudagin. 3-1 ljóðar sum ein greiður og góður sigur, men talan var um eina topp-botn uppgerð, og við manningini oddaliðið hevði, átti møguleiki verið fyri einum enn størri sigri.

Olaf Berg hevur ikki havt góð úrslit á 1. borði hjá Sandavági. Hann tapti ímóti Heina Olsen. Helst hava sandavágsmenn ætla særvið Olaf á liðnum - at tryggja sær sæti í fremstu deildini í ár, soleiðis at ungu evnaríki telvararnir har vesturi aftur kundu telva millum teir bestu komandi ár.

Hevur Olaf havt tað truplult, so hevur tað gingið hampiliga væl hjá hinum. Torkil Nielsen hevur fingið góð úrslit, og Jón Gregersen er komin væl í gongd. Og tað varð eisini Jón, sum tryggjaði heimaliðnum tað eina stigið, tá hann vann á Terja Petersen.

### Helgi við fyri fyrstu ferð

Havnarmenn hava alla kappingina havt sera óstøðuga manning. Helgi Dam Ziska - sum nú offissielt hevur fingið staðfest sítt IM-heitið – telvaði fyri havnarmenn fyri fyrstu ferð í ár. Veteranurin Rani Nolsøe megnaði ikki at steðga Helga.

Klaksvík 2 fekk kortini nógv burturúr, tí teir hálaðu tvey stig inn, og javnleikur varð tí úrslitið.

Havnarmenn vinna helst bronsuna, meðan Klaksvík 2 og Sandavágur stríðast um at sleppa undan at enda aftast. Tað fær tó ongan týdning, tí kollfirðingar tóku seg úr kappingini, og tí flytur einki lið niður í 2. deild.

### Endabresturin fyri framan

Vestmenningar eru fýra stig aftanfyri oddaliðið úr Klaksvík, men hava tveir dystir eftir, meðan klaksvíkingar bert hava ein dyst eftir at telva.

Klaksvíkingar møta havnarmonnum í seinasta umfarinum fyrst í mars, meðan vestmenningar skulu telva ímóti havnarmonnum 25. februar og síðani Klaksvík 2 á seinasta leikdegi. Tískil eru allar súðir ikki syftar, sum Nolsøe-maðurin í Kringvarpinum beinrakin plagar at taka til.

### Úrslit og støðan

**1. deild - 8. umfar**

| | |
|---|---|
| Sandavágur-Klaksvík 1 | 1-3 |
| Olaf Berg-Heini Olsen | 0-1 |
| Torkil Nielsen-Finnbjørn Vang | 0-1 |
| Bernhard Augustinussen-Ólavur Simonsen | 0-1 |
| Jón Gregersen-Terji Petersen | 1-0 |
| Klaksvík 2-Havnin | 2-2 |
| Rani Nolsøe-Helgi D. Ziska | 0-1 |
| Tummas Martin Sólsker-Martin Poulsen | 0-1 |
| Rani Baldursson-Martin Brekká | 1-0 |
| Rúni Dragaberg-Regin Reinert | 1-0 |

**Støðan**

| | Lið | Dystir | Stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Klaksvík 1 | 20,0 | |
| 2 | Vestmanna | 6 | 16,0 |
| 3 | Havnin 6 | 11,0 | |
| 4 | Sandavágur | 7 | 8,5 |
| 5 | Klaksvík 2 | 6 | 7,5 |

## U-21 lutakastið verður í morgin

**Møguleiki er at fáa eina pinkutjóð í okkara bólk, tá Føroyar fyri fyrstu ferð eru í pottinum til U-21 undankapping**

Fótbóltur
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skotland, Kassakhstan, Cypros, Malta, San Marino, Estland, Aserbadjan, Luksemburg, Liktenstein og Montenegro eru saman við Føroyum styrkismett í veikasta bólkinum, tá lutakastið verður á Hotel Hilton í Stockholm í morgin.

Lutakastið er háttað soleiðis, at í einum bólki verða tvey av niðast styrkismettu liðunum, og ivaleyst vónar føroyska ferðalagið, at Føroyar kunnu koma í slíkan bólk. Tí hóast ein størri bólkur ber hægri ferðaútreiðslur við sær, so eru ítróttarligu útlitini betri í slíkum bólki.

Fíggjarligi parturin kann tó vigað tungt, um Føroyar enda í sama bólki sum Kasakhstan, tí tað er á ongan hátt ókeypis at flyta heilan landsliðshóp hálvan veg kring klótuna.

Liðini, sum eru í pottinum, eru annars styrkismett soleiðis:

Bólkiur A: Holland, Portugal, Italia, Frakland, Týskland, Belgia, Serbia, Kekkia, Danmark, Spania.

Bólkur B: Russland, Ongland, Kroatia, Ísrael, Sveis, Ungarn, Rumenia, Ukraina, Slovakia, Slovenia.

Bólkur C: Turkaland, Grikkaland, Pólland, Hvítarussland, Noreg, Bosnia-Hersegovina, Ísland, Bulgaria, Litava, Moldova.

Bólkur D: Eysturríki, Letland, Wales, Írland, Norður Írland, Makedonia, Georgia, Armenia, Albania, Finnland.

Soleiðis kundi eitt gott føroyskt lutakast givið okkum Holland, Ongland, Ísland, Finnland og San Marino í okkara part. Hinvegin er eisini møguleiki fyri, at bólkurin inniheldur Serbia, Russland, Hvítarussland, Georgia, Kasakhstan og Føroyar. Og tann møguleikin ljóðar ikki heilt so hugaligur, sum tann fyri ger tað.

Í føroyska ferðalagnum eru Bill McLeod Jacobsen, landsliðsvenjari, Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, og Magnus á Stongum, nevndarlimur.

Bólkavinnararnir í teimum tíggju bólkunum skulu saman við fýra bestu 2'arunum dystast í play-off dystum um tey sjey plássini í endaspælinum, har vertstjóðin, Svøríki, eisini tekur lut.